# Rosenborg vann grannauppgerðina

Tað eydnaðist Rosenborg at vinna 3-2 á Brøndby á heimavølli, og harvið samanlagt 5-3 í UEFA Cup kappingini. Brøndby hevði ikki tey bestu kortini á hondini, tá dysturin byrjaði á Lerkendal Leikvøllinum í Tróndheimi, tí teir høvdu tapt heimadystin 1-2. Og tá bert eitt korter var farið av dystinum vísti samlaða støðan 3-1 til Rosenborg, tí tá hevði Didier Konan Ya lagt Rosenborg á odda. Men Brøndby vísti góðan moral og stríðsvilja, og 20 minuttir seinni høvdu teir gulu og bláu bæði javnað og lagt seg á odda 2-1, so samlaða støðan var 3-3. Í 2. hálvleiki setti heimaliðið ferðina upp, og teir teir hvítu úr Tróndheimi trýstu Brøndby-spælarnar nógv. Tá eitt stórt korter var eftir legði Pelu innfyri, og Per Ciljan Skjelbred stútaði bóltin í netið til 2-2. Brøndby kundi tó enn vinna seg víðari, um teir komu uppá 3-2. Men væl stuðlaðir av heimafjøldini hevði Rosenborg gott tamarhald á støðuni. 4 minuttir áðrenn leiklok var Roar Strand hildin í brotsteiginum hjá Brøndby, og dómarin dømdi brotsspark til Rosenborg. Marek Sapara var ísakaldur og setti brotssparkið trygt í netið. Rosenborg hevur hervið vunnið seg í bólkaspælið.



KÍ-ÍF:

# Klaksvíkingar halda ondini

**Meira enn nakað verður dysturin móti ÍF sæddur sum dysturin, ið skal bjarga KÍ frá niðurflytingarvandanum. Fuglfirðingar kunnu hinvegin eisini tryggja seg**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Skal visión 2009 ikki enda við eini roynd at vinna 1. deild, skal dysturin sunnudagin vinnast.

Somikið einføld eru boðini til KÍ, sum tá tekur ímóti ÍF í einum dysti, sum væl kann kallast fyri lagnudystur hjá KÍ. Eisini hóast spurningurin um niðurflyting ikki einans stendur og fellur við hesum dystinum.

Men við útidysti í Gøtu og heimadysti móti helst komandi meistaraliðnum eftir á skránni – umframt dystin sunnudagin – so er hetta helst besta høvið hjá KÍ at prógva, at teir eru ein sjálvskrivaður partur av bestu føroysku fótbóltsdeildini.

Tí vænta áskoðararnir helst, at talan verður arbeiðsavrik í sama flokki, sum tað var móti B71 fyri tveimum vikum síðani, og so er stóri spurningurin, hvørjar mans Petur Mohr hevur tøkar til stóru uppgávuna.

Her hava Eli Nolsøe Leifsson og Rógvi Jacobsen báðir verið darvaðir av skaða, og tað er sera ivasamt, um nakar av teimum verður tøkur, hóast Rógvi uttan iva situr á beinkinum sum ein møguligur jokari at tveita inn, skuldi tørvur verið á einum luftsterkum áleypara til seinast.

Hinvegin hevur ÍF eisini sítt at stríðast fyri. Hóast málið um yvirliving í bestu deildini næstan er rokkið, so kann tað enn kiksa, og tí ræður um hjá fuglfirðingunum at skava sær nøkur stig afturat á kontina. Móti Skála seinast gekk tað soleiðis akkurát, og lítil ivi er um, at arbeiðsavrikið skal vera betri hesaferð, um stig skulu setast inn.

Hjá teimum verður Jonn Thomsen aftur at síggja í verjuni, men hinvegin skal nýggjur maður seta liðið saman, tí Albert Ellefsen er burturstaddur við U19-landsliðnum.



*Stórt trýst hevur verið á KÍ, sum hevur havt eina sera trupla tilveru í ár. Trý stig sunnudagin kunnu tó bera við sær, at spælararnir kunnu draga andan nakað lættari seinastu tvey umførini av landskappingini*

Skála-Víkingur:

# Enn livir vónin

**Hjá Skála er tað nú alt ella einki. Verða trý stig ikki sett á kontina, kann talan samstundis gerast um matematiskt farvæl til sunnudagsfótbólt**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við bara níggju stigum eftir at spæla um byrjar tað nú av álvara at síggja svart út hjá Skála. At liðið har til eisini hevur mist bæði eitt og tvey stig í seinastu minuttunum av seinastu dystunum hevur ikki gjørt tilveruna hjá liðnum lættari, og tí er trýstið meira enn bara stórt, nú teir á heimavølli taka ímóti Víkingi.

Tí tapir Skála tann dystin, og vinnur KÍ samstundis sín dyst, er eingin møguleiki longur fyri bjarging hjá felagnum, sum tó eisini hevur royndt seg í somu støðu áður.

John Petersen hevur allar mans tøkar til uppgávuna móti Víkingi, sum kanska hevur nakað at løna Skála aftur í so máta. Tí vit skulu bara leita trý ár aftur fyri at finna støðuna, tá táverandi GÍ við máli í yvirtíðini móti júst Skála tryggjaði sær møguleikan at hanga í bestu deildini.

Hjá Víkingi er manntalið hinvegin ikki heilt so stórt. Hans Jørgen Djurhuus hevur framvegis leikbann, og tað sama hevur Símun Louis Jacobsen, eftir at hevur rokkið fimm gulum kortum. Andreas Lava Olsen hevur drigist við skaða seinastu tvær vikurnar. Hann royndi at koma inn móti HB, men tað riggaði illa, og spurningurin er tí, um hvíldin verður tikin framum hesaferð.



*Marginalarnir hava ikki verið við Skála seinastu umførini. Svørtu skýggini eru tí vorðin alsamt daprari, og nú er tvingandi neyðugt við sigri, um tilveran í Formula-deildini skal bjargast*

## Dystir um vikuskiftið

| Fótbóltur | | Formula-deildin |
|---|---|---|
| **Dagur** | **Dystur** | **Dómari** |
| 05.10 | EB/S-B36 | Lars Müller |
| 05.10 | HB-NSÍ | Georg Rasmussen |
| 05.10 | Skála-Víkingur | Ransin Djurhuus |
| 05.10 | KÍ-ÍF | Dagfinn Olsen |
| 05.10 | B71-B68 | Petur Reinert |
| **1. deild** | | |
| 04.10 | Víkingur-TB | Alex Troleis |
| **2. deild** | | |
| 04.10 | AB-TB | Jóhan P. Michelsen |
| 04.10 | Fram-MB | Bent T. Linklett |
| 04.10 | Víkingur-KÍ | Petur Reinert |
| 04.10 | 07 Vestur-ÍF | Jákup M. Kjeld |
| **Hondbóltur** | | **Sunset-deildin** |
| 04.10 | StÍF-Tjaldur | Karsten/Kristian |
| 05.10 | VB-Stjørnan | Rúni/Ragnar |
| **Atlantic Airways-kappingin** | | |
| 04.10 | StÍF-VÍF | Karsten/Kristian |
| 05.10 | Neistin-Kyndil | Sámal/Kári |
| 05.10 | H71-KÍF | Hans/Hanus |
| **Flogbóltur** | | **Meistaradeild kvinnur** |
| 04.10 | Mjølnir-ÍF | TB |
| 04.10 | Dráttur-KÍF | TB |
| 04.10 | SÍ-Fleyr | TB |